Sáttmáli millum

Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Og

Reiðarafelagið fyri Farmaskip

Sersáttmáli fyri skiparar og stýrimenn í frálandavinnu

(Multi purpose standby, supply- og ankarhandler vessels)

## §1 Sáttmálaøki

Stk. 1. Hesin sáttmáli fevnir um skip, sum eru útgjørd og góðkend til at halda vakt yvir einum og hvørjum, sum hevur við fólk at gera og “Multi purpose standby, supply- og ankarhandling vessels”

Stk. 2. Høvuðssáttmálin millum RFF og FSN er galdandi fyri hesi skip í tann mun niðanfyri nevndu viðurskifti ikki víkja frá høvuðssáttmálanum. Undantiki er tó §7 í høvuðs-sáttmálanum sum ikki er galdandi

## §2 Hýrur

Stk. 1. Mánaðarliga hýran verður ásett við útgangsstøði í høvuðssáttmálanum fyri tann lønarflokk, sum er galdandi fyri tað ávísa skipið eftir støðd í Bt/kw.

Stk. 2. Fasta mánaðarhýran er fyri 12 tímar um samdøgrið.

Stk. 3. Afturat hýruni fyri áðurnevnda lønarflokk verður latin ein viðbót ásett soleiðis:

| Dagfesting | Skipari | Yvirstýrmaður | 1. stýrmaður |
|---|---|---|---|
| Frá 1. mars 2006 | kr. 9.600,00 | kr. 6.500,00 | kr. 4.950,00 |

## §3 Yvirtíð

Um farið verður út um 84 tímar um vikuna, verður goldin yvirtíð sambært reglunum í §10 í høvuðssáttmálanum.

## §4 Frítíð og útmynstring

Stk. 1. Arbeitt verður eftir einari 1: 1 skipan. Ferðing er íroknað frítíð, tó í mesta lagi 3 dagar fyri hvørt skeið á 6 vikur. Íroknað hesum frídøgum er frítíð sambært løgtingslóg um frítíð við løn nr. 30 frá 7. apríl 1986 við seinni broytingum.

Stk. 2. Útmynstringin er í mesta lagi 6 vikur umborð, og 3 dagar til ferðing báðar vegir. Um siglt verður uttanfyri Norðurevropa er útmynstringin tó í mesta lagi 8 vikur umborð, og 3 dagar til ferðing báðar vegir.

Stk. 3. Um farið verður út um ávikavist 6 og 8 vikur umborð verður goldi ½ frídagur eyka fyri hvønn dag út yvir. Um farið verður 14 dagar út um ávíkavist 6 og 8 vikur, verður goldið 1 frídagur eyka fyri hvønn dag út yvir teir 14. Hetta er tó ikki galdandi um skiparin ella stýrimaðurin ynskja at vera longur umborð.

## §5 Viðbøtur fyri serlig arbeiðir

Stk. 1. Fyri arbeiði við serligum uppgávum, verða hesar viðbøtur givnar:

**1. mars 2009**

| | Skipari | Yvirtýrimaður | Stýrimenn |
|---|---|---|---|
| DP samsýning | 530 kr pr mánað | 421 kr pr mánað | 313 kr pr mánað |
| Ankarhondtering | 36 kr fyri hvørt, tó í mesta lagi 600 kr pr mánað | 30 kr fyri hvørt, tó í mesta lagi 500 kr pr mánað | 25 kr fyri hvørt, tó í mesta lagi 400 kr pr mánað |
| Kjarnuboring | 530 kr pr mánað | 421 kr pr mánað | 313 kr pr mánað |
| Kápulhondtering | 530 kr pr mánað | 421 kr pr mánað | 313 kr pr mánað |
| Veitingarskip | 530 kr pr mánað | 421 kr pr mánað | 313 kr pr mánað |

**1. mars 2010**

| | Skipari | Yvirtýrimaður | Stýrimenn |
|---|---|---|---|
| DP samsýning | 547 kr pr mánað | 435 kr pr mánað | 323 kr pr mánað |
| Ankarhondtering | 37 kr fyri hvørt, tó í mesta lagi 600 kr pr mánað | 31 kr fyri hvørt, tó í mesta lagi 500 kr pr mánað | 26 kr fyri hvørt, tó í mesta lagi 400 kr pr |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | mánað |
| Kjarnuboring | 547 kr pr mánað | 435 kr pr mánað | 323 kr pr mánað |
| Kápulhondtering | 547 kr pr mánað | 435 kr pr mánað | 323 kr pr mánað |
| Veitingarskip | 547 kr pr mánað | 435 kr pr mánað | 323 kr pr mánað |

Stk. 2. Pr. 1. mars 2007 hækka viðbøturnar sambært § 5 stk. 1 við í minsta lagi sama % stig sum lønartalvan. Tað sama er galdandi eftirfylgjandi ár, so leingi sum semjan um verkfall/verkbann er galdandi.

Stk. 3. Tað áliggur skipara/reiðaríinum í øllum førum at staðfesta um skipið er bundið at ella loyst frá teimum ávísu uppgávunum.

**§6 Arbeiðssteðgur**

Stk. 1. Skipari og stýrimenn, ið mynstrað undir hesum sersáttmála frásiga sær rættin til at fara í arbeiðssteðg í eitt 5 ára skeið, roknað frá 1. mars 2006.

Stk. 2. Hýruhækkingar í høvuðssáttmálanum eru eisini galdandi fyri henda sersáttmála við somu gildiskomu.

Stk. 3. Sjálvt um sáttmálin er uppsagdur, og tíðarfreistin fyri endurnýggjan er úti, skulu partarnir yvirhalda gamla sáttmálan til ein nýggjur er góðkendur ella arbeiðssteðgur er settur í verk eftir reglunum niðanfyri.

Stk. 4. Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum til at lýsa og seta í verk arbeiðssteðg eftir hesum reglum.

Stk. 5. Arbeiðssteðgur kann bert setast í verk um so er, at hann er rættstundis fráboðaður mótpartinum.

Stk. 6. Um tað er ætlanin at seta arbeiðssteðg í verk, skal tað kunngerast hinum partinum við serligum innskrivaðum brævi í minsta lagi 1 mánaða frammanundan, at arbeiðssteðgurin er ætlaður at verða settur í verk.

Stk. 7. Sum arbeiðssteðgur er her at rokna verkfall, verkbann, ella onnur niðurlegging av arbeiðinum. Tað er ikki loyvt at seta í verk arbeiðssteðg, meðan sáttmálin er í gildi.

**§7 Bjarging**

Um reiðaríið við sáttmála hevur frásagt sær rætt til bjargingarløn, hava skipari og stýrimenn ikki rætt til bjargingarløn.

## §8 Gildi

Stk. 1. Hesin sáttmálin kemur í gildi tann 1. mars 2009, og kann sigast upp frá báðum pørtum við 3 mánaða varningi, fyrstu ferð til 1. mars 2011.

Tórshavn, 18. mars 2009

Føroya Skipara- og Navigatørfelag Reiðarafelagið fyri Farmaskip